FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Løgtingið
(Trivnaðarnevndin)
Tinghúsv. 1-3
FO 100 Tórshavn

Staður: Tórshavn, 19.10.2023
J. nr. (MEGD): 701-9-2023
Ummælistíð: Eingin

J.nr (AMR).: 22/09429-30

lógaruppskoti LM-023/2023: Broyting til lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk

Lógaruppskotið

Almanna- og Mentamálaráðið skjýtur upp at strika serliga undantakið í § 13, stk. 2 í løgtingslógini um arbeiðsfremjandi tiltøk; hetta so, at ung við serligum tørvi, sum ganga í serliga skipaðum skúlatilboði ikki longur skulu hava rætt til serliga stuðulsveiting frá Almannaverkinum eftir reglunum um arbeiðsbúgving.

Endamálið við uppskotinum er,

at tálma almenna útreiðsluvøksturin (sparing) og
at javnseta ung við serligum tørvi við onnur ung lesandi.

Verður ásetingin í § 13, stk. 2 strikað, verður tað eitt fíggjarligt bakkast fyri tey ungu við breki, sum eru 22 ár og yngri, og sum ganga á teimum serligu skúlatilboðunum og sum alofast búgva heima hjá foreldunum. Hesin samfelagsbólkur fer at missa meiri enn helvtina av sínum inntøkugrundarlagið: 3.067 kr. í arbeiðsbúgvingarstuðli, og tey fara at hava einast 2.113 kr. í lestrarstuðli frá Studna eftir. Av hesum skal gjaldast skattur, kringsvarpsgjald, Heilsutrygdargjald, og tá verður lítið eftir til, klæðir, frisør, tannlækna, frítíðarítriv og hvat ung annars nýta pening til.

Umstøður og rættindi teirra at mennast og luttaka í samfelagnum vera sostatt verri, enn tær longu eru. Samstundis sum Almanna- og Mentamálaráðið bjóðar ein fíggjarligan

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100
Tórshavn

Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15

megd@megd.fo

www.megd.fo

hjálparpakka til fólk, ið eru fíggjarliga illa sperd, verða umstøður og rættindi hjá fólk við breki skerd á skipaðan hátt. Gjógvin millum ung, ið bera brek, og ung, ið ikki bera brek, fer eftir tískil at vaksa munandi.

Løgfrøðilig meting

Lógaruppskotið tykist ikki at samsvara við rættindi, ið eru staðfest í galdandi lóggávu, t.e. í:

yvirskipaða endamálinum við føroyskari sosiallóggávu og grundleggjandi rættindi, ásetingar og viðmerkingar til altjóða brekrættindasáttmálan.

a)Bannið móti mismuni og kravið um javnviðgerð

Sambært lógaruppskotinum hevur broytingin til endamáls, at javnseta ung í skúlaaldri. Sterkar ábendingar eru hinvegin um, at úrslitið tvørturímóti kann vera mismunur móti ungum við breki.

Ung, sum ikki hava serligar avbjóðingar, hava møguleikar at hava eitt arbeiði eftir skúlatíð. Nakað, sum ung við breki ikki hava, og sum júst er orsøkin til, at tey eru undir arbeiðsbúgving eftir løgtingslógini um arbeiðsfremjandi tiltøk.[1]

Í almennu fyrisitingini er *líkareglan*[2] galdandi, sum merkir, at løgfrøðiliga líkar umstøður, skulu viðfarast eins. Í hesum føri er tó talan um, at umstøðunar júst ***ikki*** eru eins, við tað at talan er um ein bólk av ungum, sum hevur avgerðandi avmarkingar, eitt nú í mun til menning og førleikar, og ikki somu inntøkumøguleikar sum onnur. Tískil ber ikki til at rættvísgera broytingina við tilvísing til fyrisitingarligu líkaregluna, um tað hevur verið meiningin hjá uppskotstillarunum.

Brekrættindasáttmálin hjá ST bannar mismuni orsaka av breki - bæði beinleiðis og óbeinleiðis – sambært grein 5, samanhildin við:

1. grein 1, endamálsorðing og allýsing av breki og

[1] Løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021

[2] Larsen og á Rógvi: Fyisitingarrættur, 2. økt útg, m.a. s. 54 2012.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100
Tórshavn

Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15

megd@megd.fo

www.megd.fo

2. greinarnar 24 (útbúgving), 25 (heilsa) og 27 (arbeiði og starvssetan)

Til tess at tryggja, at talan verður um veruliga javnviðgerð/javnstøðu hava limalondini nevniliga skyldu at beina burtur samfelagsiligar forðingar og fremja serlig átøk (kompensering). Tiltøk, sum gera, at fólk við breki kunnu fáa veruliga javnstøðu (de facto javnstøðu).

Sáttmálin hevur tí eina rød av tiltøkum, sum kunnu kompensera, og kunnu vera viðkomandi í hesum konkreta málinum, m.a.

1. greinarnar um útbúgving og arbeiði og
2. habilitering (førleikamenning) í grein 26, sum kunnu vera viðkomandi ásetingar í hesum sambandi.

Allýsingin av breki í grein 1 vísur, at tað einans er í mun til karmar og umhvørvi, at eitt brek gerst avmarkandi. Tískil eru *tillagingar* alneyðugar til, um fólk við breki, skulu verða javnssett við onnur, ið ikki bera brek.

Í sama høpi er týdningarmikið at leggja til merkis, at serlig tiltøk, sum verða sett í verk fyri at røkka javnstøðu, verða í sjálvum sær ikki verða roknað sum mismunur, staðfestir sáttmálin, sbr. grein 5(4):

> Serlig tiltøk, sum neyðug eru til tess at skunda undir ella at fáa í lag verulig javnrættindi fyri fólk, ið bera brek, verða ikki mett sum mismunur sambært hesum sáttmála

Verður undantakið í § 13, stk. 2 strikað verður avleiðingin – um ikki annað verður sett í staðin – at fíggjarligu umstøðurnar hjá teimum ungu versna munandi, og vandi er fyri, at tey ikki fara at nýta serliga skúlatilboðið. Tá kann sigast, at Føroyar ikki uppfylla sína skyldu at kompensera fyri muninum, og at tey ungu við breki ikki verða javnviðgjørd.

Talan kann tá vera um mismun, møguliga beinleiðis mismun, við tað at talan er um sparitiltak, sum burturav rakar fólk við breki.

b)Kravið um inklusjón

Verður uppskotið samtykt, er sum skilst, vandi fyri, at fleiri fara at velja serbreytina frá av fíggjarligum grundum. Hetta hongur eisini saman við, at talan er um eitt 4-ára

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100
Tórshavn

Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15

megd@megd.fo

www.megd.fo

skúlatilboð, og harvið eyka uppihaldsútreiðslum fyri foreldrini. Vandi er fyri, at foreldrini ikki hava fíggjarligt rásarrúm til hendan møguleikan, og tískil fara at søkja um fyritíðarpensjón til barnið, so skjótt tað verður 18 ár. Um øll hesi ungu enda sum fyritíðarpensjónistar, er mánaðarliga útreiðslar áleið kr. 15.000 fyri hvønn persón, umframt at skattainntøka fer at mangla, um tey ikki eru virkin á arbeiðsmarknaðinum. Í stuttum kann tí verða mett, at útreiðslurnar kunnu blíva væl komanfyri 4 ferðir so høgar, um hendan sparing verður framd.

Bæði sosiala lóggávan og Brekrættindasáttmálin hjá ST eru grundað á eina hugsan um, at fólk við breki hava rætt til at liva eitt so vanligt og sjálvstøðugt lív sum tilber, eins og tað framgongur av almennu viðmerkingunum til løgtingslógina um almannatrygd og tænastur, at

> *lógin er niðasta fíggjarliga trygdarnetið fyri teir borgarar, sum ikki sjálvir megna at uppihalda sær og sínum.*[3]

Ber tað til at klára seg uttan almannahjálp, er tað altíð best. Og minsta sosiala inntrivið skal altíð takast fram um tað meira víðgongda.

Endamálið við løgtingslógini um arbeiðsfremjandi tiltøk, er á sama hátt at tryggja, at fólk varðveita sambandið við arbeiðsmarknaðin (tað veruliga lívið) í staði fyri at *fáa óvirkna hjálp til uppihald*, sbr. almennu lógarviðmerkingunum:

> *Yvirskipaða málið við rúmliga arbeiðsmarknaðinum er, at rúm skal vera fyri øllum á arbeiðsmarknaðinum – eisini persónum við breki, sjúku ella sosialum trupulleikum. Virkni og luttøka í samfelagslívinum er eitt aðalmál í sjálvum sær, ið helst skal virka við til, at flest møgulig gerast fíggjarliga sjálvbjargin av at arbeiða.*

Skipanin við arbeiðsbúgving hevur also fíggjarligt sjálvbjargni sum mál, og av serligu lógarviðmerkingunum til § 8 um arbeiðsbúgving[4] stendur eisini, at endamálið er, at *fólk, sum eru í fyritíðarpensjón* kunnu gerast meira leys av hesum hjálparskipanum.

[3] Løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2022

[4] Løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100
Tórshavn

Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15

megd@megd.fo

www.megd.fo

Nevnast kann her, at lógin um almannapensjónir[5] byggir eisini á eitt prisipp um sjálvbjarni og inklusjón í vanliga samfelagið, sum tað t.d. framgongur av § 3 um rættin til fáa fyritíðarpensjón:

> *Pensjón, undantikið pensjón sambært § 7, nr. 2, kann ikki tillutast persónum undir 60 ár, um møguleikar eru fyri at seta í verk fyriskipanir, ið meira enn fyribils betra arbeiðsevnini, ella um møguleiki er fyri at útvega eitt eftir viðurskiftunum hjá viðkomandi hóskandi arbeiði.*

Um úrslitið av lógarbroytingini verður, at fleiri av fíggjarligum orsøkum velja serbreytina frá og fara undir fyritíðarpensjón, *gongur hetta beint ímóti meginregluni* í okkara sosialu lóggávu, og sum fer at gera hesi ungu *meira bundin av almannahjálp*.

Ein slík gongd er eisini í ósamsvari við Brekrættindasáttmálan hjá ST, sum byggir á grundregluna um *inklusjón og eitt sjálvstøðugt lív;* har londini hava bundið seg til attryggja fólki við breki atgongd til tað vanligu útbúgvingingarskipanina, eisini við rætti til neyðugan stuðli, sum kann gera útbúgvingina møguliga, sbr. greinarnar 3 (c), 19 og 24.

c) Progressiv/stigvaksandi realisering av sáttmálarættindum

Til endans kann lógaruppskotið møguliga vera í ósamsvari við grein 4(2) í Brekrættindasáttmálanum. Hóast sáttmálin sum útgangsstøði byggir á eina reglu um at fíggjarlig rættindi (og mentanarlig og sosial) – so sum skúlatilboð - kunnu vera bundin at fíggjarvánum og resursum hjá einstaka landinum, so inniheldur 4(2) tó eitt krav um, at tað skal vera ein *progressiv* (stigvaksandi/stigvís) *realisering* av sáttmálarættindunum. Tað er t.d. í sambandi við grein 4(2), at ST krevur, at londini hava eina virksiætlan, sum ítøkiliga stingur út í kortið hvussu londini ætla, at útinna sáttmálarættindini í verki.

ST-nevndin hevur ikki sagt so nógv um hvussu ásetingin um progressión/stigvøkstur skal tulkast, men eitt ávíst tulkingaríkast fæst tó í einum úttalilsi í samband við grein 24 um júst útbúgvingarmøguleikar, sum eru viðkomandi í hesum máli:

[5] AVLAMISPENSJÓNSLÓGIN, ALMANNAPENSJÓNSLÓGIN, FÓLKAPENSJÓNSLÓGIN, PENSJÓNSLÓGIN - Løgtingslóg 48 mai 10 1999 .pdf

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100
Tórshavn

Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15

megd@megd.fo

www.megd.fo

> ST-nevndin sigur at, at "*progressive realization must be read in conjunction with the overall objective of the Convention*" og at londini í tí sambandi "*are encouraged to redefine budgetary allocations for education, including by transferring part of their budgets to the development of inclusive education*", og síðani staðfestir ST-nevndin, at "*any deliberately retrogressive measures (tiltøk, sum ganga skeivan vegin) (...)must not disproportionately target learners with disability at any level of education*."[6]

Sostatt er tað onkursvegna eitt krav, at tænastur ikki bara kunnu versna, og at tilvitaðar ella vilkorligar broytingar til tað verra ikki er loyvdar.

Verður stuðulin til arbeiðsbúgving – sum er meira enn helvtin av fíggjarliga grundarlagnum hjá hesum ungu – kvettur av í einum høggi, uttan at annað verður sett í staðin, ber út frá hesum helst til at siga, at talan er um eitt (tilvitað) og órímiligt afturstig, og sum harvið ikki er í samsvari við grein 4(2) í Brekrættindasáttmálanum hjá ST.

Í hesum sambandi er vert at nevna, at í Danmark hava tey t.d. eitt sokallað «handicap tillæg» í SU-skipanini fyri folk í hægri útbúgving, sum ikki hava førleika, at arbeiða aftaná skúlatíð. Hetta er júst ein ásannan av, at ung við breki eru verri fyri enn onnur, og tískil verða kompenserað fyri hendan munin.

Um arbeiðsbúgvingarstuðulin verður erstattur av øðrum fíggjarligum stuðli, t.d. einum serstuðli frá Studna, sum svarar til verandi hálp, er broytingin ikki (longur) í ósamsvari við sáttmálan. Tá er broytingin bert formlig, og ikki eitt reelt afturstig.

Vísandi til omanfyristandai mælir MEGD løgtinginum frá at taka undir við lógaruppskotinum.

Vinarliga

MEGD

[6] Bantekas, Stein og Anastasiou: The UN Convention on The Rights of Persons with disabilities. A commentary, 2018

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100
Tórshavn

Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15

megd@megd.fo

www.megd.fo